

## Jógvan spyr

Jógvan við Keldu, løgtingsmaður, vil hava at vita frá Jóannesi Eidesgaard, løgmanni, um innlendismálaráðið umsitur mál um arbeiðs- og uppihaldsloyvi eftir sama leisti, sum honum varð álagt at gera, tá hann var landsstýrismaður. Hann vil eisini hava at vita um nøkur ávís mál, sum hann ikki helt seg kunna loysa eftir galdandi lóg. Jógvan spyr, um málini eru loyst nú, og um viðkomandi lúka treytirnar fyri arbeiðs- og uppihaldsloyvi nú.

## Kann skaða sáðið

Amerikanskir granskarar hava illgruna um, at menn, sum tosa nógv í fartelefon hvønn dag, kunnu fáa trupulleikar við, at teirra sáð verður ikki so gott, sum tað annars hevði verið. Granskararnir hava kannað sáðið hjá monnum, sum tosa nógv í fartelefon, og monnum, sum als ikki brúka fartelefon, og úrslitið var, at sáðið hjá teimum, sum brúka fartelefonina nógv, var munandi verri enn hjá hinum. Nú skulu fleiri kanningar gerast.

# Skumpar undir at fáa nyttu úr heitari orkukeldu í Vági

**Óli Breckmann skumpar nú undir at fáa størri nyttu burturúr øllum tí heita avlopsvatninum frá elverkinum hjá SEV í Vági**

ORKUKELDA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

*Ber til at gera baðiland í Vági?*
*Ella kanska heilsumiðstøð?*
*Ella ber til at fara undir aling við heitum vatni?*

Elfelagið SEV hevur eitt stórt elverk í Vági. Men alt tað heita avlopsvatni, sum rennur frá hesum elverkinum, verður ikki gagnnýtt, men rennur burtur til onga nyttu.

Nú ger Òli Breckmann, løgtingsmaður, so eina roynd at skumpa undir, at hetta heita avlopsvatnið verður gagnýtt.

Í Løgtinginum í morgin, mikudagin, fer hann at spyrja landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm, hvørjir møguleikar eru fyri at gagnnýta avlopsorkuna frá verkinum í Vági.

Óli Breckmann heldur, at tað kundi verið áhugavert at vitað, hvussu stór avlopsorkan hjá SEV-verkinum í Vági er og um hon kann gagnnýtast og, hvussu hetta kann gerast.

Og tað er hetta, hann vil sera hol á við fyrispurningi sínum til landsstýrismannin í vinnumálum.

Løgtingsmaðurin vísir á, at Løgtingið hevur gjørt stórar íløgur í undirstøðukervið í Suðuroy, mest Smyril, samferðsluhavn og í tunnil ímillum Øravík og Hov.

Hann heldur, at nógv uppskot kundi verið um at brúkt avlopshitan frá SEV til alskyns endamál. Tað

Kundi verið til aling, ella tað kundi verið til fjarhita til hús og bygningar.

Men tað kundi eisini hugsast, at onkur fekk ta hugskot at brúka avlopshitan til eina heilsumiðstøð ella ein frítíðardepil við baðilandi, íbúðum o.ø., sum føroyingar kenna úr útlondum.

– Ein frítíðarmiðstøð við tryggari, og kanska bíligari, orku frá SEV-verkinum í Vági kundi verið brúkt alt árið og hon hevði fingið fólk norðanfjørðs at vitja Suðuroy meir. Samstundis høvdu helst eisini útlendingar í Føroyum í størri mun lagt leiðina um Suðuroyarfjørð.

Hetta hevði somuleiðis ført við sær, at Smyril hevði ført fleiri ferðafólk og bilar og fingið størri inntøku enn nú.

– Men mest av øllum hevði handils- og tænastuvinnan í Suðuroy fingið gagn av slíkari heilsu- og frítíðarmiðstøð, heldur Óli Breckmann.

– Men sama, hvat endamál avlopsorkan á SEV-verkinum í Vági hevði verðið nýtt til, hevði tað skapt arbeiði, virksemi, inntøkur og trivnað í Suðuryoy, leggur Løgtingsmaðurin afturat.



*Óli Breckmann heldur, at tað kundi verið áhugavert at vitað, hvussu stór avlopsorkan hjá SEV-verkinum í Vági er og um hon kann gagnnýtast og, hvussu hetta kann gerast*

# Vil hava menn á dyr og fleiri kvinnur í løgtingið

**Løgmaður skal nú greiða Løgtinginum frá um hann ætlar at gera nakað við uppskotið um at løgtingsmenn lata tingsessin frá sær í tvær til fýra vikur og lata teir kvinnuligi varalimirnir sleppa á ting ístaðin**

JAVNSTØÐA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Herfyri komu javnstøðunevndin og nevndin, sum virkar fyri øktum kvinnuleikluti í politikki, við tí uppskoti, at tingmenn víkja sætið á Løgtingið í tvær til fýra vikur fyrst í komandi ári og lata kvinnuligir varalimirnar taka sætið á tingi ístaðin.

Og nú vil Heidi Petersen, løgtingskvinna, hava at vita, hvat løgmaður heldur um hetta og um hann ætlar at virka fyri, at tað verður sett í verk.

Tað verður í Løgtinginum í morgin, mikudagin, at Løgmaður skal greiða tingfólki frá síni støðu til hetta mál.

Men Heidi Petersen vil eisini hava Løgmann at greiða frá um hann heldur, at javnstøðupolitikkurin hjá samgonguni er nøktandi.

Í hesum sambandi sigur løgtingskvinnan, at landsstýrismaðurin í javnstøðumálum hevur alment boðað frá, at hann onki fer at gera við uppskotið.

Og hon vil eisini hava at vita um Løgmaður góðtekur, at landsstýrismaðurin í javnstøðumálum ikki á nakran hátt tekur undir við endamálinum í javnstøðulógini, sum hon tekur til.

Heidi Petersen sigur, at ein grundgeving fyri uppskotinum hjá javnstøðunevndini og nevndini fyri øktum kvinnuleikluti í politikki, er, at mannfólkini á tingi fáa alla umrøðuna og allar møguleikarnar at vísa sínar dygdir. Og av tí sama er ójavnstøðan á tingi sjálvforstyrkjandi, og tí eiga vit at byrja eina góða kringrás við kvinnum á tingi.

Men ein onnur grundgeving er, verður uppskotið sett í verk, sær Føroya Fólk, at tað ber til hjá kvinnum at umboða veljaran á tingi og gera seg galdandi í øllum málum.



*Heidi Petersen vil hava hava at vita um ætlanin er at fylgja uppskotinum um at menninir í Løgtinginum víkja sætið í nakrar vikur og lata kvinnuligi varalimirnar sleppa framat*